## DAGSINS MEINING

### Sínámillum álit og framtíð

Nú framsýning um oljuleitingina við Føroyar letur upp á Náttúrugripasavninum leygardagin er eisini rætt at gera støðuna upp á nettupp hesum økinum. Hvussu hevur gingist, hvussu langt eru vit komin og hvønn veg ber tað. Hetta eru spurningar, ið avgjørt eru rættir at seta rundan um eina slíka hending sum hesa, har føroyingurin á einum stað kann fáa innlit í oljuverðina sum heild og í, hvar vit standa í hesi verð.

Tað eru umleið 10 ár síðani, at danir lótu føroyingum rættin til ráevnini í undirgrundini. Ein hending, sum varð veruliga startskotið til ta leiting, ið nú er veruleiki. Tá fóru føroyskir myndugleikar straks undir neyðugu fyrireikingarnar, ið fevndu um lóggávu, forkanningar, mennan av egnum førleika osfr. Ein forðan varð kortini, og tað var áseting av undirgrundarmarki. Eftir miðvíst og professionelt arbeiði frá føroyskari síðu eydnaðist tað at fáa bretar at góðkenna miðlinjuna sum mark, og tann góðkenningin var so aftur startskotið til fyrstu útbjóðingina. Og eftir tað varð so farið at bora. Úrslitið av fyrstu boringunum kenna vit. Tveir turrir brunnar og ein møguliga lønandi brunnur. Tað fáa vit meira at vita um næstu mánaðirnar.

Tá hugsað verður um, hvussu stórar upphæddir oljufeløgini brúka til at bora í hesum økinum er einki at siga til, at tey eru varin, tá tað ikki gongst sum mett og ætlað. Tí hava eisini fleiri av feløgunum gjørt av at at gera fleiri kanningar, áðrenn tey fara at bora brunnar í 200 millióna klassanum aftur. Vit vita av royndum aðrataðni frá, at oljufeløg finna tey einki alt fyri eitt, so royna tey at sleppa sær undan at bora írestandi brunnarnar. Kanska tey keypa seg úr tí avtalu tey hava bundið seg til. Hetta má ikki henda her hjá okkum. Tað skal vera okkara vón, at oljufeløgini, ið higartil hava gjørt eitt stórt arbeiði á landgrunninum, halda fram við hesum og bora ALLAR teir brunnar tey hava pliktað seg til. Her liggur eisini stór ábyrgd á okkara myndugleikum at tryggja Føroya fólki, at tær avtalur, sum gjørdar eru við oljufeløgini, verða hildnar, av báðum pørtum. Tí má tað ikki henda, at myndugleikarnir afturfyri nógvar pengar sleppa oljufeløgunum undan teirra forpliktilsum. Fyri eina framtíðar oljuvinnu er tað altavgerandi, at allir 8 brunnarnir verða boraðir. Um so avtalur verða gjørdar at flyta onkrar av hesum brunnum er so nakað annað. Oljufeløgini, sum í kapping við onnur feløg, hava fingið tey tá bestu økini, mugu tí eisini halda seg til skyldur sínar.

Vit ivast tó onga løtu í, at oljufeløgini fara at halda sínar skyldur mótvegis føroyska samfelagnum, men vit halda tað eisini vera rætt við eitt slíkt høvi sum hetta, tá Føroya fólk fyri fyrstu ferð kann fáa eitt samlað yvirlit yvir leitingina á einum stað, at bæði myndugleikar og feløg verða mintir á avtalurnar – men við tí sínámillum áliti, sum er bygt upp øll árini og við framtíðini fyri eygað, ivast vit ikki í, at allir teir avtalaðu brunnarnir verða boraðir. Bert á tann hátt ber til at kortleggja størri part av undirgrundini og harvið eisini økja um møguleikarnar at finna olju í tí stóra øki, sum føroyski landgrunnurin er.

**Sosialurin**

# Gallup setir ferð á í Føroyum



*Michael Jensen, adm. stjóri fyri Gallup í Danmark, sigur, at teir veita álítandi og óheftar kanningar til virki, men teir geva eisini sítt til samfelagskjakið*

**Kenda greiningarfyritøkan Gallup ætlar sær at bjóða føroyskum fyritøkum ein størri og meiri umfatandi kanningarmøguleiki. —Føroyski politikarar skulu eisini venja seg við veljarakanningar, sigur Regin Reinert, hagtalsserfrøðingur hjá Gallup**

GALLUP
*Heri á Rógvi*

Gallup er ein víðagitin fyritøka. Gallup er óivað mest kent fyri sínar veljarakanningar, men teir skunda sær at leggja aftur, at hesin parturin bert er eitt prosent av samlaða umsetninginum hjá Gallup.

Gallup hevur brynjað seg út við einari deild í Føroyum. Talan er tó um eina føroyska fyritøku, har Gallup er partaeigar, og teir sleppa at gera sær dælt av háttaløgum og servitanini hjá Gallup í Danmark.

Í Danmark arbeiða 150 fólk fyri Gallup, og tá eru teir nógvu spyrjararnir ikki íroknaðir.

Síðani í februar mánað í ár hevur Gallup verið virkið í Føroyum, og teir eru komnir so langt, at teir hava fingið fleiri kundar, sum fevna bæði um smærri og størri fyritøkur.

— Vit kunnu gera kanningar um stórt sæð alt. Vit eru longu virkin á einari longri røð av økjum, sigur Michael Jensen, administrerandi stjóri fyri Gallup í Danmark.

Hann vísir á, at teir eru virknir í øllum førum veljarakanningum til internet, og tær bjóða bæði kvantitativar og kvalitativar kanningar.

Gallup hevur gjørt samstarsvavtalu við Fregnir um at gera veljararkanningar í Føroyum. Hesar vera einaferð um mánaðin. Regin Reinert, hagtalsserfrøðingur, sum arbeiðir sum chef statistikari fyri Gallup í Danmark, vísir á, at teir høvdu munandi minni skeivleika í teirra veljarakanning undan løgtingsvalinum. Hetta hóast teir spurdur "einans" 530 fólk, har onnur kanningum spurdi munandi fleiri fólk.

— Føroyski politikarar skulu eisini venja seg við veljarakanningar, sigur Regin Reinert. Hann heldur, at politikarar í Føroyum mugu læra seg at nýta kanningar.

Ætlanum hjá Gallup Føroyar, sum føroyska fyritøkan fer at kallast, er at bjóða øll sløg av kanningum í Føroyum. Higartil eru nakrar sokallaðar omnibus kanningar gjørdar, har spurt verður um mangt og hvat, sum so verður nýtt í alskyns kanningum, ymsar fyritøkur hava bílagt. Tey vænta, at eisini tað almenna fer at gera sær dælt av kanningunum í framtíðini.

— Vit kendu, at tað var ein tørvur fyri hesum í Føroyum. Eingin annar bjóða heldur tað sama, sigur Ellindur Egilsstrøð, sum er stjóri fyri Gallup Føroyar.

Regin Reinert sigur, at teir mugu spara, har teir kunnu, og hetta ger, at teir spyrja um fimmhundrað fólk hvørja ferð, men hetta gevur kortini eitt gott úrslit við teimum arbeiðsháttum og metingum, ið Gallup ger.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:
### Framvegis stuðul til skipasmíð

ES-nevndin samtykti mikudagin, at skipasmiðjurnar í ES-londunum skulu fáa fíggjarligan stuðul eina tíð afturat.

ES hevur lagt sak ímóti Suðurkorea við kravi um, at suðurkoreanska stjórnin skal gevast við at stuðla landsins skipasmiðjum. Málið er fyri í altjóða handilsfelagsskapinum WTO, og so leingi eingin avgerð er fallin har, kunnu skipasmiðjurnar í ES-londunum framvegis fáa stuðul, sigur ES-nevndin.

ES vil vera við, at tær suðurkoreansku skipasmiðjurnar trýsta prísirnar á nýbygningum niður, og at hetta letur seg gera, tí skipasmiðjurnar fáa almennan stuðul. ES gavst við at veita sínum skipasmiðjum stuðul fyri tveimum árum síðani, og ES-nevndin sigur, at talan verður ikki um at seta ta gomlu stuðulsskipanina í gildi aftur. Men fyribils kunnu tær so fáa stuðul.

### Myllumet

Danir gera so nógvar vindmyllur sum ongantíð fyrr. Í fjør vaks sølan heili 60 prosent, og umsetningurin hjá vindmylluvirkjunum kom upp í 20,5 milliardir krónur. Meiri enn 95 prosent av teimum donsku vindmyllunum fara til útlendskar marknaðir, og donsku virkini eiga 50 prosent av heimsframleiðsluni. Størstu keyparalondini eru Týskland og USA.

Umleið 20.000 danir arbeiða nú í vindmylluídnaðinum. Bara í fjør vaks talið á starvsfólkum í hesum ídnaðinum ein fjórðing.

### Helst á heysin

Stóra amerikanska fyritøkan World Com fer eftir øllum at døma á heysin, eftir at kredittefirlitið hevur meldað fyritøkuna fyri at hava svikað í roknskapinum. Sambært eftirlitinum hevur fyritøkan snýtt í bókhaldinum, soleiðis at úrslitið í roknskapinum var einar30 milliardir krónur betri, enn tað í veruleikanum var.

# Russland nú er av heimsins ríkastu londum



*Amerikanski forsetin, George W. Bush, við fundarborðið hjá G8-londunum. Tað eydnaðist ikki Bush at fáa undirtøku fyri kravinum um, at Arafat ska lfara frá sum palestinskur leiðari*

*Mynd: Reuters*

**Russland fekk í gjár limaskap í felagsskapinum, sum myndar átta tey ríkastu londini í heiminum**

G8-FUNDURIN
*Árni Joensen*

Seinastuárini hevur russisiki leiðarin tikið lut á toppfundinum hjá tí sonevnda G8-bólkinum, sum umfatar USA, Bretland, Kanada, Frakland, Týskland, Japan, Italia og Russland. Men í veruleikanum hevur Russland bert havt eitt slag av einum B-limaskapi, tí í tí sonevnda G7-bólkinum, sum telur tey ríkastu londini í heiminum, hevur Russland ikki havt limaskap.

Men tað hevur landið nú fingið.

Í einari felags kunngerð frá toppfundinum í Kanada stendur, at heimurin er broyttur, og at Russland hevur víst bæði vilja og evni til at virka við til at loysa teir trupulleikar, sum heimurin hevur. Tí hevur landið nú fingið limaskap javnbjóðis hinum limalondunum.

#### Miðeystur

Sum væntað fekk ófriðurin í Miðeystri drúgva umrøðu á G8-fundinum. Har kom fram, at hinir leiðararnir taka ikki undir við kravinum hjá amerikansku stjórnini um, atYasser Arafat skal frá sum palestinskur leiðari.

Bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, segði seg taka undir við amerikansku stjórnini í, at Arafat hevur ikki gjørt nóg mikið fyri at steðga harðskapinum, men hann legði afturat, at bretska stjórnin styðjar ikki kravið um, at Arafat skal frá. Franski forsetin, Jacques Chirac, gjørdi greitt, at tað eru palestinar einsamallir, sum gera av, hvør er teirra leiðari.

Á toppfundinum samdust tey átta londini um at strika ein part av skuldini hjá teimum fátækastu londunum í heiminum. Men treytin er, at londini fremja umfatandi búskaparligar og politiskar nýskipanir.

# Vil hava Noreg upp í ES

**Noreg hoyrir til Evropa, og tað harmar okkum, at landið ikki er limur í ES, sigur eysturríkski kanslarin**

NOREG
*Árni Joensen*

Eysturríkski kanslarin, Wolfgang Schússel, segði í Oslo í gjár, at Noreg eigur ikki at standa uttan fyri ES.

- Eg minnist væl, hvussu vit og Noreg í 1989 stríddust fyri at fáa ein so góðan EBS-sáttmála sum gjørligt. Eitt av londunum, Sveits, kom ikki upp í sáttmálan. Noreg kom ikki við, tá fleiri av hinum londunum søktu limaskap í ES, og tað harmar okkum, segði eysturríkski kanslarin.

Í Noregi hevur Wolfgang Schússel tosað við Kjell Magne Bondevik, forsætisráðharra um ymisk felags áhugamál. Á fundinum gjørdi eysturríkski kanslarin greitt, at lurur Noregs í altjóða friðarroyndum hevur havt og hevur framvegis alstóran týdning.

Wolfgang Schússel er ein av teimum fremstu talsmonnunum fyri einum felags evropeiskum uttanríkis- og verjupolitikki.

Úr Norðurlondum:
### Fartelefonir hentar

Fartelefonir kunnu mangan vera hentar. Í Danmark sigur bjargingartænastan, at tað er fartelefonini fyri at takka, at tað hava verið munandi færri boð eftir bjargingartænastuni tey seinastu árini, enn vanligt var fyrr.

Í fjør vóru boð eftir bjargingartænastuni 394 ferðir, og tað var bara helvtin av tí, sum var vanligt fyrr. Talsmaðurin hjá tænastuni, Alex Jensen, sigur, at hetta kemst av, at so nógv fólk hava fartelefon hjá sær, og at tey tí boða skyldfólki ella vinfólki frá, koma tey í neyð. Tí fær bjargingartænastan munandi færri fráboðanir nú enn fyrr, sigur hann.

### Ókeypis P-bollar

Í januar samtykti norska Stórtingið, at gentur, sum eru millum 16 og 19 ára gamlar, skulu hava rætt til ókeypis P-bollar.

Samtyktin er uttan iva væl móttikin, tí sambært heilsumyndugleikunum hava teir síðani í januar latið ókeypis P-bollar, sum tað annars hevði kostað gentunum 3,8 milliónir krónur at keypa.

Samstundis vísir tað seg, at minni enn so allar genturnar vita, at tað ber til at fáa ókeypis P-bollar, og tí rokna heilsumyndugleikarnir við, at uppaftur fleiri gentur fara at gera brúk av skipanini í komandi tíð.

### Ongar sex-lýsingar

Ógvusligt trýst frá kvinnufelagsskapum og øðrum noyðir nú finsku bløðini at gevast við at prenta lýsingar frá kvinnum, sum bjóða ymsar sex-tænastur. Trýstið kemur serliga blaðnum Helsingin Sanomat illa við. Blaðið hevur havt nógvar sex-lýsingar, og fyri tær hevur blaðið fingið einar átta milliónir krónur um árið.

Kvinnufelagsskapirnir í Finnlandi hava mælt fólki frá at keypa tey bløðini, sum hýsa lýsingum við sex-tænastum.